# Effersøe søgan: Vestina misti mannin, áðrenn sonurin varð føddur

**Tað koma framvegis nýggir gravsteinar í gamla kirkjugarði á Svínaryggi. Tann seinasta er hjá Vestinu og Peter F. Christiansen**





*Peter*


*Vestina*


*John í Mettustovu, pápi Vestinu*


*Peter F. Christiansen, sonur Vestinu og Peter*

**230. partur**

Peter F. Christiansen er eitt kent navn í Havn. Fyrst og fremst var hann kendur sum stjóri á "gomlu" Dimmalætting ta tíðina, hon var kend fyri at vera ein sera fíggjarliga sterk fyritøka. Eisini var hann við í politikki. Hann var býráðslimur og eisini býráðsformaður, umframt at hann var løgtingsmaður og landsstýrismaður fyri sambandsflokkin.

Tað er minni kent, at pápi Peter F. eisini æt Peter F(erndinand). Eitt tað seinasta, sum Peter F. skipaði fyri, var at fáa sett gravstein yvir foreldur síni. Hann náddi ikki at síggja tað sjálvur, men børnini hava fingið steinin settan upp.

Teimum báðum var ikki langt lív lagað. Peter F. (eldri) var sonur Ommukissa, Christian Christiansen, sum fyri kortum varð umrøddur í hesi røð. Hann giftist við Maren Elisabeth Vestinu Holm Joensen, vanliga kallað Vestina. Men tey fingu ikki langa tíð saman. Petur, sum var prentari á Dimmalætting, doyði 27 ára gamal 18. mai 1923, sum sonurin varð føddur fýra mánaðir seinni tann 22. september.

Peter F. kom tískil onga tíð at síggja pápa sín. Hjá eini ungari einkju var ikki nógv hjálp at fáa tá í tíðini, so Vestina mátti klára seg sum frægast. Hon hevði árini 1928-1930 postlínshandil heima hjá sær sjálvari í Niels Finsensgøtu. Anthony Nielsen, fyrsti barberur í Føroyum, hevði eitt skifti klippistovu hjá Vestinu og seinni hevði Sigrid Lützen fotoatelier har.

Hennara meira drúgva starv var hjá Dimmalætting, har hon eisini gekk í húsini við rokningum. Tað segðist, at hon var rættiliga avgjørd. Hon noktaði snøgt sagt at fara avstað aftur, fyrr enn hon hevði fingið tann pening, hon kom eftir. Sonurin, Peter F., man hava havt nakað somu eginleikar!

Maria Djurhuus og Haldor Christiansen vóru systkinabørn Peter F., og tey siga, at tað var gott samband millum ættirnar. Teir vóru tríggir einnevndir, sum gingu í sama flokki, Peter C., beiggi tey bæði, Petur F. og Petur P., sonur Wensil Petersen. Hesir báðu seinnu doyðu blaðungir.

Maria minnist eisini Vestinu sum hjálpsama. Tá ið hon skuldi konfirmerast, var mamma hennara sjúk. Men tá tók Vestina um endan við tí, sum skuldi gerast.

Men Vestina fekk heldur ikki mong ár lagað. Hon doyði longu í 1946, 54 ára gomul.

Peter F. yngri, giftist við Paulu Solveig Abrahamsen av Strondum. Tey fingu børnini Petur F, John og Guðrið Hervør Vestina.

### Ættin hjá Vestinu

Ættin hjá Peter F. er fyrr umrødd í hesi røð. Her skal tískil verða umrødd ættin hjá Vestinu.

Hon var av Effersøe ættini. Langabbin, Jón, var tann fyrsti Effersøe í Føroyum. Hann rýmdi til Føroya eftir at hava verið í parti við Hundadagkonginum, Jürgen Jürgensen, sum eitt stutt skifti hevði valdið í Íslandi. Í Føroyum giftist hann við Susanne Olesdatter í Vestmanna. Tey fingu nógv børn, sum komu at fáa stóran týdning fyri okkara samfelag, og eru tey umrødd í hesi røð. Eisini er ættin umrødd í Miðvikuni, har vit fyri tveimum árum síðani høvdu eina áhugaverda røð við Lise Effersøe Edwards, abbadóttir John Effersøe, sum var beiggi Rasmus, Oliver og Poul.

Ein dóttir Jón var Elisabeth Gurið Vestina, fødd í 1819 Vestmanna. Hon giftist við Johannes Joensen, Johannes á Hospitalinum, í Havn.

Hann var ættaður av Kletti í Havn. Hann hevði verið handilsbetjentur bæði við kgl. Úthandilin á Tvøroyri og á Fitjunum í Vestmanna, áðrenn hann fekk starvið sum umsjónarmaður á Hospitalinum, og hetta starv røkti hann, til hann doyði nýggjársaftan 1902.

Ein sonur teirra var John Jacobæus Joensen (1846-1900) sum í 1884 giftist í Havnar Kirkju við Onnu Helenu Cladinu Holm (1851-1931).

Hann var vanliga nevndur John í Mettustovu. Navnið má vera komið av, at hann hevur hildið til í Mettustovu, sum abbi hansara keypti, og har mostrar hansara Josefina, Vilhelmina og Henrietta búðu og høvdu mótahandil.

Tey fingu umframt Vestinu:
Johannes Olaus Joensen, (1885-1955), keypmaður
Eliesar Gunnar Holm Joensen f. 1887
Christen Holm Joensen.

### Søgan hjá pápanum

John í Mettustovu var føddur í Vestmanna 9. apríl 1846. Hann fór ungur til skips við eingilska skiparanum gamla Woolnough, sum var væl kendur millum føroyingar. Hann var við honum fyrst sum dekkari, og síðan sum bestimaður, og tað var ikki smávegis veiða, teir løgdu upp í Grimsby um árini.

Tá ið John hevði siglt nøkur ár út frá Grimsby, fór hann til Danmarkar at ganga uppá skúla og tók helst stýrimansprógv í Vordingborg, har hann átti eina systir búgvandi stutt frá. Hann kemur heim aftur til Føroya og førdi Waterwitch hjá Thomsen á Tvøroyri í 1873 og út várið 1874.

Næsta skip, hann førdi í 1881 og 1882, var sluppin Gustav, sum J. Jeramiassen, Elduvíks Jóannes, keypmaður í Havn, átti saman við øðrum.

Árið eftir, at Niclas á Trappuni doyði umborð á Sprite í 1882, fór John at føra skipið. Tað gjørdi hann til tað sleit og fór á land og gjørdist vrak á Tinganesi 15. mars 1890.

John førdi eisini eitt skifti Fox, sum byrjaði slupptíðina í 1872.

John fór so at føra Lerkin hjá M.C. Restorff í 1890 til fiskiskap. Men í desember sama ár gjørdi hann keypslag um skonnartina Cyclone úr Onglandi og kom á Havnina við henni 22. mars 1891.

Hann stovnaði saman við pápanum og mammubeiggjanum Oliver P. Effersøe og øðrum partafelagið Cyclone, sum síðan keypti skonnartina frá honum við skjøti frá 3. apríl 1891. John í Mettustovu førdi nú Cyclone til út í juli mánað 1894, tá ið Jens Dam í Havn loysti hann av. Cyclone gekk annars burtur við allari manningini í 1903.

Tá ið John fór av Cyclone legðist hann upp á land með alla. Hann doyði 1. juli 1900.

Jógvan, beiggi John, var í mong ár skipari í Grimsby og førdi m.a. sluppina Emma og var leingi fiskikongur har.

Jacobina var gift við donskum skipara Wilhelm Hansen, sum í 1886 varð dripin av kinesiskum sjórænarum í Sumatra. Henda hending er fyrr umrødd í hesi røð.

**Komandi partur**
Komandi partur verður seinast í september, og hann verður um Onnu og Hans Simonsen í Norðradali.